# Skulu gera skjótt av

**Nógvar fyrireikingar eru eftir, til ein føroysk MRCC-støð er klár. Myndugleikarnir skulu bera skjótt at, sæst í uppskotinum til eykajáttanarlóg, har biðið verður um 20 milliónir krónur til at keypa Telegrafstøðina til MRCC-støð**

TILBÚGVING
*Magnus Dam*



*Alt bendir á, at Landsstýrið fer at keypa Telegrafstøðina frá Føroya Tele fyri 20 milliónir til MRCC-støð*

Hóast málið ikki var endaliga avgreitt, áðrenn blaðið fór til prentingar í gjár, so bendi alt á, at Tele-grafstøðin kemur at húsa MRCC-støðini.

Landsstýrið skuldi viðgera málið einaferð enn á fundi í gjár, og tilmælið frá Fiskimálastýrinum er tað sama, sum tað hevur verið alla tíðina. Fiskimálastýrið eigur at keypa Telegrafstøðina fyri 20 milliónir krónur frá Føroya Tele, og MRCC-støðin skal so hava innivist har.

### Liggur væl fyri

MRCC stendur fyri Maritime Rescue and Coordination Center, og sum ein sovorðin miðstøð í samband við bjarging og samskipan er bygningurin sera væl egnaður. Har er góð útgerð og gott pláss, og harafturat liggur bygningurin væl fyri. Ikki er langt til aðrar almennar myndugleikar so sum løgregluna, politisku skipanina og sjúkrahúsverkið. Frammanundan er Tórshavn Radio í bygninginum, og Tórshavn Radio er ein týdningamikil liður í MRCC-tilbúgvingini. Ætlanin er so, at Fiskiveiðieftirlitið og sostatt eisini Vaktar- og bjargingartænastan skulu húsast í Telegrafstøðini saman við Tórshavn Radio.

Fiskimálastýrið hevur kannað aðrar hølismøguleikar, men niðurstøðan er, at eingin er líka væl egnaður sum Telegrafstøðin. Alternativið er at lata bretar taka sær av MRCC-tilbúgvingini úr Aberdeen, og hetta er ikki ein loysn sum hóvar hvørki Fiskimálastýrinum ella Landsstýrinum sum heild.

### Langt eftir á mál

Verður Telegrafstøðin vald sum miðdepil fyri MRCC-tilbúgvinina, so skulu føroysku myndugleikarnir gera skjótt av fyri at fáa støðina klára til 1. apríl. Tann dagurin er evstamarkið – tá skulu føroyingar vera til reiðar við tilbúgvingini. Eru teir ikki tað, so verður helst eingin oljuboring í Føroyum í summar. Oljufeløgini skulu eftir ætlan seta borin í í juni, og tað gera tey ikki, um føroyingar ikki hava fingið síni viðurskifti í rættlag.

Ætlanin er, at øll starvsfólkini, sum skulu manna MRCC-støðina skulu vera sett í seinasta lagi 15. februar. Tey skulu útbúgvast til at arbeiða á støðini, og hendan útbúgvingin byrjar 19. februar. Starvsfólkini skulu eisini á venjing í Bretlandi, og avtalan um at venja føroysku starvsfólkini, sum er gjørd við MRCC-Aberdeen, kann neyvan útsetast.

Í triðja lagi skulu starvsfólkini hava royndarvenjingar, og hesar verða eftir ætlan í mars. Tá skal útgerðin á støðini eisini royndarkoyrast. 1. apríl skulu starvsfólkini hava lokið neyðugu útbúgvingina og støðin klár at taka í nýtslu.

Eftir hetta skal MRCC-støðin luttaka í venjingum saman við føroyskum myndugleikum og samstarvsfeløgum, og síðani verður ein sokallað full-scale venjing, har allir myndugleikar og oljufeløgini luttaka.

### Undir somu lon

Verður avgerðin um at keypa Telegrafstøðina tikin nú, so roknar Fiskimálastýrið við, at støðin verður klár, tá ið oljufeløgini fara undir royndarboringarnar í juni. Annars mugu bretar taka sær av tilbúgvingini, og tá er vandi fyri, at annað virksemi eisini endar í Bretlandi, stúrir Fiskimálastýrið fyri.

Fiskimálastýrið vísir eisini á aðrar fyrimunir við at keypa Telegrafstøðina. Í løtuni húsast Fiskimálastýrið og stovnar undir Fiskimálastýrinum í trimum ymsum bygningum. Ætlanin er harumframt at yvirtaka Skipasýnið, sum eisini skal hava innivist onkrastaðni. Fiskimálastýrið heldur, at Telegrafstøðin við uppí- og umbygging kann húsa øllum virkseminum hjá stýrinum.

– Hervið kunnu 3 leigumál sigast upp, og óneyðugt verður við einum 4. leigumáli at húsa Skipasýninum, vísir Fiskimálastýrið á.

2 milliónir krónur eru settar av á fíggjarlógini til tilbúgving í ár, og í eykajáttanarlógini biður Landsstýrið um 20 milliónir krónur afturat til at keypa Telegrafstøðina.

## 20 prosent er ov nógv

**Sjálvstýrisflokkurin heldur, at eingni skal kunna eiga meira enn 10 prosent av føroysku alivinnuni. Ætlaða hámarkið uppá 20 prosent er ov høgt, sigur flokkurin í yvirlýsing**

ALIVINNA
*Magnus Dam*

Hóast samgonguflokkarnir eru samdir um, at tað er neyðugt at avmarka rættin hjá virkjum og einstaklingum at keypa seg inn í alivinnuna, so eru flokkarnir ikki á einum máli um, hvussu hetta skal gerast.

Meðan Bjarni Djurholm ætlar at seta hámarkið til 20 prosent, so mælir Sjálvstýrisflokkurin til, at eingin skal kunna eiga meira enn 10 prosent av føroysku alivinnuni. Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin taka undir við hámarkinum uppá 20 prosent, men Sjálvstýrisflokkurin sigur í einari yvirlýsing, at hetta er ov høgt.

Flokkurin heldur tað vera óheppið, at eitt einstakt virki fær ov stórt vald í alivinnuni, og við uppskotna hámarkinum uppá 20 prosent kunnu fimm virki ella einstaklingar koma at eiga alla alivinnuna.

Sjálvstýrisflokkurin mælir til at hámarkið verður sett til 10 prosent, og at reglan um, at útlendingar í mesta lagi kunnu eiga triðingin av partapeninginum í einum alivirki, verður varðveitt.

– Flokkurin mælir til, at landsstýrismaðurin sum skjótast tekur stig til at tryggja, at fá hesi viðurskifti í rættlag, stendur í yvirlýsingini frá Sjálvstýrisflokkinum.

– Alivinna má metast javnt við annað tilfeingi føroyinga, og tað ber ikki til, at vit í Føroyum seta okkum í ta støðu, at vit gerast eitt útjaðaraøki hjá t.d. einum ella nøkrum fáaum stórum útlendskum alifyritøkum, sigur flokkurin at enda í yvirlýsingini.

Spurningurin um ognarviðurskiftini gjørdist aktuellur aftur, tá norska felagið Pan Fish herfyri kom við einum tilboði um at keypa 50 prosent av partapeninginum í Havsbrún, sum er ein av stóru eigarunum í alivinnuni. Bjarni Djurholm og Vinnumálastýrið gjørdu skjótt av og snikkaðu saman eitt uppskot, sum sigur, at eingin skal kunna eiga meira enn 20 prosent av alivinnuni. Um hetta so verður hámarkið, sum løgtingið skal taka støðu til, ella um Sjálvstýrisflokkurin fær síni sjónarmið ígjøgnum, er ikki greitt enn.

# Prestagarður fyri løgtingið

**Er tað rætt, at prestagarður ikki verður bygdur eftir vanligum leisti, eiga vit at byggja sjálvir, heldur Sámal Petur í Grund, nú líkt er til, at danir ikki vilja byggja prestagarð á Glyvrum**

FYRISPURNINGUR
*Magnus Dam*

Glyvra prestagjald er nýggjasta prestagjald í Føroyum. Prestagjaldið er eisini einasta prestagjald, sum ikki enn hevur ein prestagarð. Presturin í prestagjaldinum, Meinhard Bjartalíð, húsast í einum leigaðum húsum, og skrivstovuna hjá sær hevur hann í einum hølum í kirkjuni.

Fólkakirkjan er ikki føroyskt málsøki, og tí er tað uppgávan hjá danska Kirkjumálaráðnum at syrgja fyri, at presturin í nýggjasta føroyska prestagjaldinum fær ein prestagarð at húsast í. Men Kirkjumálaráðið vil ikki byggja prestagarð í Glyvra prestagjaldi. Orsøkin sigst vera fullveldismálið. Kirkjumálaráðið vil ikki byggja ein nýggjan prestagarð, um Føroyar gerast fullveldisríki og sostatt yvirtaka fólkakirkjuna og øll onnur málsøki. Kirkjumálaráðið vil fyrst síggja, hvør loysn kemur burturúr fullveldisætlanunum hjá landsstýrinum.

### Ovboðið

Eysturoyartingmaðurin Sámal Petur í Grund úr Sjálvstýrisflokkinum reisir nú málið á løgtingi í einum fyrispurningi til Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismann. Sámal Petur í Grund vil hava at vita, hvar málið stendur í løtuni, og hvat ætlanin er at gera, um Kirkjumálaráðið stendur fast við avgerðina um ikki at byggja prestagarð á Glyvrum.

Hann heldur tað vera óheppið, at einstaklingar í teirra virki koma í klemmu av rembingunum, sum eru millum Føroyar og Danmark.

– Tá gerst ovboðið, sigur Sámal Petur í Grund í viðmerkingunum til fyrispurningin.

Tingmaðurin vil eisini hava Torbjørn Jacobsen at greiða frá, um landsstýrið er sinnað at loysa málið uttanum Kirkjumálaráðið. Sjalvur heldur hann, at hetta er rætta loysnin.

– Er tað rætt, at prestagarður ikki verður bygdur eftir vanligum leisti, so eiga vit at bera skjótt av og byggja sjálvir. Tað kann ikki vera rætt, og er ikki verdugt, at tað skal liggja í donskum hondum, um ein prestur í Føroyum hevur tak yvir høvdið ella ikki, heldur Sámal Petur í Grund.

Løgtingið hevur ikki enn tikið støðu til, um Tórbjørn Jacobsen skal svara fyrispurninginum.





*Pauli Larsen, skipari á Smyrli, er skelkaður av tilburðinum týsmorgunin, tá ein russiskur trolari rendi út fyri Smyril beit uttan fyri Molan í Havn. Skiparin sammetir støðuna við, tá Ternan og Ritan rendu saman og Ritan sakk*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Russi mundi gjørt av við Smyril

**Tað var um reppið, at Smyril rendi saman við einum russiskum trolara beint út fyri molan í Havn týsmorgunin**

ÓSKETNI
*John Johannessen*

Tað var maskinorkuni og skjóta atburði skiparans fyri at takka, at túrurin við Smyrli av Drelnesi til Havnar týsmorgunin ikki endaði við einari vanlukku.

Tá Smyril nærkaðist Molanum við 72 ferðafólkum umborð og skuldi til at sneiða inn um, kom brádliga ein russiskur trolari undan Norrönu, sum lá ytst við Molan. Trolarin sneiddi beint út fyri Smyril, sum enn hevði nógva ferð á.

– Eg gjørdist ógvuliga kløkkur, tá eg sá russiska trolaran. Støðan var álvarsom, og gjørdi eg tí av at sláa bakk og snara beinan vegin, greiðir Pauli Larsen, skipari á Smyrli, frá.

Pauli Larsen metir, at fjarstøðan millum Smyril og russiska trolaran var umleið 300 metrar, tá hann sló bakk.

– Tað tekur tó eina løtu, frá tí, at tú slært bakk, til eitt skip fer at bakka. Men tíbetur hevur Smyril góða maskinorku, og tí eydnaðist tað okkum at koma undan, sigur Pauli Larsen.

Var Smyril komin longur inn, áðrenn skiparin uppdagaði russiska trolaran, var tó ikki vist, at tað hevði eydnast at bakka og sneitt undan. Smyril hevði tá verið so nær grótkastinum, at vandi hevði verið fyri, at valið hevði staðið ímillum at rent saman við trolaranum ella inn í grótkastið.

Men hóast tað hevði eydnast Smyrli at steðga, roknar Pauli Larsen ikki við, at russiski trolarin hevði havt nóg stóra maskinorku til at steðga, og tí hevði hann helst rent inn í síðuna á Smyrli.

### Boða ikki frá

Smyril hevur stóran skund, tá hann kemur úr Suðuroynni um morgnarnar. Umborð eru fólk, sum skulu náa flogrutuna, og harafturat eisini fólk, sum skulu skunda sær til arbeiðis í Havn ella nærhendis.

Pauli Larsen, skipari á Smyrli, sigur, at vanligt er í havnum uttanlands, at havnarskrivstovan syrgir fyri, at ferðamannaskip og ferjur ikki verða tarnað av ferðslu, sum annars kann bíða. Havnarskrivstovurnar kenna ferðaætlanirnar hjá ferjunum, og tí syrgja tær fyri, at virksemið í sjálvari havnini er minst møguligt, júst tá ferjur koma og fara.

Á havnarskrivstovuni í Havn kenna tey eisini ferðaætlanina hjá Smyrli og hinum ferjunum hjá Strandfaraskipum Landsins. Men Pauli Larsen sigur, at tað kortini javnan kemur fyri, at Smyril fær trupulleikar av, at skip verða send beint út fyri hann.

– Tað hendir javnan, tá vit skulu fara frá bryggju, at skip nærhendis fáa loyvi at loysa samstundis og tí sigla beint fyri okkum. Tá er tað gott, at Smyril hevur so góða maskinorku og er so lættur at snara, sum hann er, sigur Pauli Larsen.

Skiparin á Smyrli sigur, at Strandfaraskip Landsins fleiri ferðir hava gjørt havnarskrivstovuni vart við trupulleikan, men at hetta kortini ikki hjálpir.

– Havnarskrivstovan eigur at stýra ferðsluni í havnini. Men hesa uppgávuna røkir hon ikki nóg væl. Tí eru viðurskiftini í Tórshavnar Havn heldur ikki nóg trygg, sigur Pauli Larsen, skipari á Smyrli.

Í hesum sambandi vísir Pauli Larsen á tilburðin miðskeiðis í sekstiárunum, tá strandfaraskipini Ternan og Ritan rendu saman og Ritan sakk. Tá vóru umstøðurnar líknandi teimum týsmorgunin.

Sosialurin hevur roynt at fingið fatur á vakthavandi hjá Tórshavnar Havn, men hesin hevur onga viðmerking.


útsølan er byrja

| | Fyrr | Nú |
|---|---|---|
| Nike air Texel gangiskógvar | 749,- | 399,- |
| Adidas Sahale gangiskógvar fyrr upp til | 699,- | 399,- |
| Adidas Revel " | 599,- | 348,- |
| Adidas lawsuit " | 499,- | 299,- |
| Fila skógvar, gangiskógvar fyrr upp til | 699,- | 399,- |
| Adidas Tarant innanduraskógvar | 799,- | 499,- |
| Adidas world team innanduraskógvar | 699,- | 399,- |
| Nike renniskógvar kvinnur | 549,- | 299,- |
| Adidas " | 799,- | 399,- |
| Adidas " | 699,- | 349,- |
| Adidas renniskógvar harrar | 799,- | 399,- |
| Nike " | 799,- | 399,- |
| Adidas aerobicskógvar kvinnur | 699,- | 399,- |
| Adidas Sahale gangiskógvar børn | 299,- | 199,- |
| Firefly barnaskógvar | 349,- | 199,- |
| Nike barnaskógvar | 349,- | 199,- |
| Adidas og Nike babyskógvar | 299,- | 150,- |
| Puma frítíðarsett børn | 499,- | 250,- |
| Adidas t-shirts børn | 149,- | 79,- |
| Adidas sweatshirt børn | 349,- | 150,- |
| Adidas " | 299,- | 150,- |
| Adidas pant børn | 299,- | 150,- |
| Adidas " | 399,- | 199,- |
| Adidas hettutroyggja børn | 349,- | 150,- |
| Adidas polyesterdrakt vaksin | 499,- | 299,- |
| Adidas frítíðarsett vaksin | 799,- | 399,- |
| Adidas og Puma hettutroyggja vaksin | 399,- | 199,- |
| Adidas rennijakki vaksin | 399,- | 249,- |
| Firefly pant vaksin | 300,- | 150,- |

og mong onnur góð tilboð

P/F THOMAS DAM
ÍTRÓTTUR • N. Finsensgøta 5 • Postsmoga 268 • 110 Tórshavn
Tel. 31 14 03 • E-mail: sporthd@post.olivant.fo